# Alonso nærkast Hamilton

**Kappingin um heimsmeistaraheitið í formil 1 gjørdist hetta vikuskiftið uppaftur tættari, tá Fernando Alonso vann frammanfyri liðfelaganum, Lewis Hamilton. Nú eru einans trý stig millum báðar kappingarneytarnar í suverenu silvurgráu McLaren Mercedes bilunum**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tvífaldi heimsmeistarin í formil 1, Fernando Alonso, vann í gjár italsku koyringina á Monza frammanfyri McLaren-Mercedes liðfelaganum, Lewis Hamilton, ið á degnum, als ikki avbjóðaði suverena spaniólan.

Heimsmeistaraheitið í formil 1 er enn fullkomiliga víðopið, við nú einans trimum stigum millum Hamilton á fyrsta plássi og Alonso á øðrum, er tað púra vónleyst at gita um, hvør teirra stendur á ovastu rók, tá kappingarárið endar um hálvan annan mánað.

### Ferrari ikki við longur

Fyri tveimum vikum síðan meldaði Ferrari seg veruliga innaftur í kappingina um heimsmeistaraheitið, tá FelipéMassavannframmanfyri liðfelaganum Kimi Räikkönen. Men hetta vikuskiftið meldaði liðið seg útaftur úr kappingini. Felipé Massa noyddist eftir eina lovandi byrjan gevast, og hóast Räikkönen við eini djarvari eitt-steðg pittstrategi, slapp framvið Hamilton, so var Ferrari bilurin ikki nóg skjótur á degnum, og ungi bretin koyrdi framvið aftur finnanum, ið fekk triðja plássið. Við bert fýra koyringum eftir og Räikkönen og Massa ávikavist 18 og 23 stigum aftanfyri Hamilton á fyrsta plássi, er tað neyvan nakar, ið trýr at Ferrari, kann avbjóða um heimsmeistaraheitið í ár. Ein seinasti møguleiki eru tó, at McLaren verður revsað og missur stig í stóra njósnaramálinum, sum í hesum døgum fyllur meira enn tað ítróttarliga í formil 1.

### Góð BMW úrslit

Nick Heidfeld og Robert Kubica hátíðarhildu, at BMW hevur longt teirra sáttmálar við fjórða og fimta plássi.

Mest óvæntaða úrslitið mundi tó vera, at Jenson Button fekk sín annars vanliga so vónleyst vánaliga Honda bil í stigini, og við einum áttanda plássi, vísti Button eitt sindur av teirri góðsku, ið gjørdi hann til stóru bretsku vónina fyri bert fáum árum síðan.

Hetta vikuskiftið var tað tó trygdin, ið gjørdi mest vart við seg. Bæði Kimi Räikkönen og David Coulthard høvdu sera ógvislig óhapp, Räikkönen í tíðarkoyringini leygardagin og Coulthard í koyringini sunnudagin, men hvørgin fekk stórvegis mein. Hetta vísti enn einaferð, hvussu tryggir formil 1 bilarnir eru.



*Fernando Alonso vann frammanfyri liðfelaganum Lewis Hamilton, og er nú veruliga beint í hølunum á liðfelaganum í kappingini um heimsmeistaraheitið*

*Mynd: Polfoto*

## HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | McLaren-Mercedes | 166 stig |
| 2 | Ferrari | 143 stig |
| 3 | BMW | 86 stig |
| 4 | Renault | 38 stig |
| 5 | Williams-Toyota | 25 stig |
| 6 | Red Bull-Renault | 16 stig |
| 7 | Toyota | 12 stig |
| 8 | Super Aguri-Honda | 4 stig |
| 9 | Honda | 2 stig |

## Italska formil 1 koyringin á Monza

| Úrslit | Koyari | Lið | Tíð | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | McLaren-Mercedes | 1:18:37.806 | 10 |
| 2 | Lewis Hamilton | McLaren-Mercedes | +6.0 sek | 8 |
| 3 | Kimi Räikkönen | Ferrari | +27.3 sek | 6 |
| 4 | Nick Heidfeld | BMW | +56.5 sek | 5 |
| 5 | Robert Kubica | BMW | +60.5 sek | 4 |
| 6 | Nico Rosberg | Williams-Toyota | +65.8 sek | 3 |
| 7 | Heikki Kovalainen | Renault | +66.7 sek | 2 |
| 8 | Jenson Button | Honda | +72.1 sek | 1 |
| 9 | Mark Webber | Red Bull-Renault | +75.8 sek | |
| 10 | Rubens Barrichello | Honda | +76.9 sek | |
| 11 | Jarno Trulli | Toyota | +77.7 sek | |
| 12 | Giancarlo Fisichella | Renault | +1 umfar | |
| 13 | Alexander Wurz | Williams-Toyota | +1 umfar | |
| 14 | Anthony Davidson | Super Aguri-Honda | +1 umfar | |
| 15 | Ralf Schumacher | Toyota | +1 umfar | |
| 16 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | +1 umfar | |
| 17 | Vitantonio Liuzzi | STR-Ferrari | +1 umfar | |
| 18 | Sebastian Vettel | STR-Ferrari | +1 umfar | |
| 19 | Adrian Sutil | Spyker-Ferrari | +1 umfar | |
| 20 | Sakon Yamamoto | Spyker-Ferrari | +1 umfar | |
| - | Felipe Massa | Ferrari | Givin | |
| - | David Coulthard | Red Bull-Renault | Óhapp | |

(kelda: f1.com)

## HM fyri bilførarar

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | Ongland | McLaren-Mercedes | 92 stig |
| 2 | Fernando Alonso | Spania | McLaren-Mercedes | 89 stig |
| 3 | Kimi Räikkönen | Finland | Ferrari | 74 stig |
| 4 | Felipe Massa | Brasilia | Ferrari | 69 stig |
| 5 | Nick Heidfeld | Týskland | BMW | 52 stig |
| 6 | Robert Kubica | Póland | BMW | 33 stig |
| 7 | Heikki Kovalainen | Finland | Renault | 21 stig |
| 8 | Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 17 stig |
| 9 | Alexander Wurz | Eysturríki | Williams-Toyota | 13 stig |
| 10 | Nico Rosberg | Týskland | Williams-Toyota | 12 stig |
| 11 | Mark Webber | Avstralia | Red Bull-Renault | 8 stig |
| 12 | David Coulthard | Skotland | Red Bull-Renault | 8 stig |
| 13 | Jarno Trulli | Italian | Toyota | 7 stig |
| 14 | Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 5 stig |
| 15 | Takuma Sato | Japan | Super Aguri-Honda | 4 stig |
| 16 | Jenson Button | Ongland | Honda | 2 stig |
| 17 | Sebastian Vettel | Týstkland | STR-Ferrari | 1 stig |

(kelda: f1.com)